Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum

Evni: Gomlu vindmyllurnar hjá SEV

Spurningar:

1. Hvaðani hevði landsstýriskvinnan upplýsingarnar, sum hon gav Løgtinginum tann 3. mai í ár, í svari uppá skrivligan fyrispurning frá undirritaða, har sagt varð, at átøk eru gjørd fyri at minka um sannlíkindini fyri, at trupulleikar verða við gomlu vindmyllunum hjá SEV, og at ongar ábendingar eru um, at tillagingarnar ikki virka eftir ætlan?

2. Metir landsstýriskvinnan framvegis, at svarið sum hon gav, var rætt?

3. Metir landsstýriskvinnan, at gomlu vindmyllurnar hjá SEV eru í góðum standi?

Viðmerkingar:
Tann 12. apríl í ár setti undirritaði landsstýriskvinnuni við umhvørvismálum ein skrivligan fyrispurning um støðuna viðvíkjandi vindorku, SS-005/2022. Í viðmerkingunum til fyrispurningin varð vist á, at tað hevði ljóðað, at fleiri av teimum gomlu myllunum hjá SEV annaðhvørt vóru steðgaðar ella vóru í ferð við at steðga, tí tær vóru í so vánaligum standi. Spurt varð tí, um roknast kundi við, at fleiri myllur fóru at steðga tey næstu árini orsakað av, at tær vóru í ringum standi.

Landsstýriskvinnan svaraði fyrispurninginum tann 3 mai. Hon segði, at átøk eru gjørd, sum skulu forða fyri, at fleiri av myllunum blíva í ólagi, og at ongar ábendingar eru um, at tillagingarnar ikki virka eftir ætlan.

Men tann 15. juni 2023 segði deildarstjórin hjá SEV við Kringvarpið, at flestu myllurnar í Neshaga standa stillar, og at ivasamt er, um nakað verður gjørt við tær, tí tað loysir seg ikki.

Her tykist ikki vera samsvar millum tað, sum landsstýriskvinnan upplýsti fyri Løgtinginum, og tað, sum SEV segði nakrar vikur seinni. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 22. august 2023

Helgi Abrahamsen